## Aðalfundur hjá Cøliakifelag Føroya

**10. mai 1997 í MBF-húsinum, Íslandsvegi 10, Tórshavn**

Fundurin verður settur kl. 14.00 við hesi skrá:
**Marita Olsen**, formaður í Cøliakifelag Føroya, bjóðar vælkomin og setur fundin

Kl. 14.15–15.00
**Dr. med. E. Gudmand-Høyer**, yvirlækni á Medicinsk-gastroenterologisk afdeling F, København Amts Sygehus í Gentofte, heldur **almennan fyrilestur** um evnið: **Cøliaki hjá vaksnum**

Kl. 15.00–15.30
Høvi at seta spurningar. **Óli Jacobsen**, med. yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, serlækni í garna- og tarmsjúkum, tekur samanum

**Fundarstjóri: Jákup Mørkøre**

Kl. 15.30–16.00
Kaffisteðgur

Kl. 16.00
**Aðalfundurin settur:**
1. Velja fundarstjóra
2. Ársfrágreiðing formansins
3. Grannskoðaður roknskapur framlagdur
4. Limagjald ásett fyri komandi ár
5. Velja nevnd, tiltakslimir og grannskoðara
6. Innkomin mál
7. Ymiskt

Øll áhugað eru vælkomin á fundin.

**NEVNDIN**

# Skeið í lættlisnum barnabókmentum

*Bókadeild Føroya Lærarafelags skipar fyri norðurlendskari stevnu í barnabókum, ið eru lættar at lesa*



*28. - 30. mai verða lættlisnar barnabókmentir á skránni í Norðurlandahúsinum*

Eirikur Lindenskov

Annað hvørt ár verður norðurlendsk stevna hildin, har bókavørðar o. o. við áhuga fyri barnabókmentum koma saman. Í ár er tað Bókadeild Føroya Lærarafelags, ið er vertur fyri stevnuni, sum verður um lættlisnar barnabókmentir.

Stevnan verður í døgunum 28. - 30. mai, og koma eini 20 fólk úr hinum norðurlondunum.

Frá Bókadeildini siga tey, at talan er um fólk, ið koma ymsastaðnis frá. Onkur umboðar kenslumálaráðini, summi eru teldufólk, onnur bókavørðar meðan nøkur umboða lærdu háskúlarnar.

Stevnan verður í Norðurlandahúsinum, og fara umboð úr ymsu norðurlondunum at greiða frá tí, ið tey arbeiða við í samband við lættlisnar barnabókmentir. Úr Føroyum fara ymisk at greiða frá, eitt nú Doris Hansen um tey brekaðu í Føroyum, Regin Ellingsgaard um Internetið og um Norðurlendska Skúlanetið. Hann fer eisini at siga frá, hvussu heimasíður verða gjørdar o. s. fr. Martin Næs, landsbókavørður fer at greiða frá um føroyskar bókmentir, og Hans Trygvi Teirin fer at tosa um evnið: Tey brekaðu - tabu í føroyskum bókmentum.

## Føroya Sparikassi

Søkt verður eftir avloysara at byrja í telefonavgreiðsluni í Føroya Sparikassa skjótast gjørligt.

Skrivlig umsókn verður at senda til Føroya Sparikassa, postboks 34, 110 Tórshavn, att.: Starvsfólka- og útbúgvingardeildin, í seinasta lagi 10. mai 1997

Starvsfólkadeildin
Postboks 34
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI

# Enn óvist hvør fer at umsita marknamálið

Jan Muller

Hóast nýggi bretski forsætisráðharrin, Tony Blair er um at vera liðugur við at seta teir mongu ráðharrarnar í síni stjórn, so er ikki heilt greitt, hvør ráðharri ella vararáðharri fer at hava ábygdina av marknaspurninginum. Neyvan er hetta heldur tað málið, sum hevur størst skund hjá nýggju Labourstjórnini at fáa avgreitt, nú flokkurin skal til at finna seg sjálvan aftur á trúnini eftir 18 ár úti í myrkrinum.

Og tó - spurningurin um markið við Føroyar hevur helst nógv størri týdning fyri bretskar myndugleikar, enn føroyingar flestir geva sær far um. Soleiðis eingin semja er gjørd um markið er ein stórur partur av áhugaverdum øki millum Bretland og Føroyar, sum hvørki av londunum kann nema við. Her er serstakliga talan um tað stóra hvíta økið.

Eftir tí sum Sosialurin hevur skilt, so verður tað ikki Joyce Quin, fyrrverandi varauttanríkisráðharri í skuggastjórn Labours, sum fær marknamálið sum sítt málsøki.

Valdagin hevði blaðið samrøðu við hana, har hon gjørdi greitt, at hon fór at gera alt fyri at kunna seg um málið, kom Labour til valdið og hon skuldi umsita tað.

Tað verður Doug Henderson, sum skal umsita Europapolitikkin hjá stjórnini og ikki Joyce Quin, sum áður hildið. Hon verður ístaðin sett sum vararáðharri í innanríkismálaráðnum.

Men umframt uttanríkismálaráðið, so hevur eisini handils- og ídnaðurmálaráðið okkurt at siga í spurninginum um markið. Her kemur John Battle, sum varð orkumálaráðharri í skuggastjórnini, at umsita orku og harvið eisini oljumálini. Tað verður tí hildið, at hann saman við Doug Henderson verða menninir, sum koma at taka avgerðir og stýra politikkinum í spurninginum um marknaáseting millum Føroyar og Bretland.

Hóast talan er um eitt uttanríkispolitiskt mál, so stendur eisini greitt, at DTI, tvs. Handils- og Ídnaðarmálaráðið fylgir neyvt við øllum tí, sum hendir í málinum, tí avgerðir tiknar í hesum spurningi hava stóran týdning fyri oljuídnaðin.

## 1. meistari

Søkt verður eftir 1. meistara til ísfiskapartrolara.

**Tlf. 83744**

**Skráseting Føroya**
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

**Skrásetingar-nr.**
P/f 1863, **P/f Norð-El, 700 Klaksvík**

**Viðtøkur broyttar:**
25.01.1997

**Nýtt navn:**
Sp/f Norð-El

**Kapitalur:**
Hækking við
kr. 70.000,00 til
kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 70.000,00 til
kurs 100

**Tekningarreglur:**
Felagið verður teknað av stjóranum ella av allari nevndini í felag

**Skráseting Føroya**
tann 06. mai 1997

**Kristin Balle**

## Deyvafelag Føroya

**Skrivstovan í Deyvahúsinum »Effata«, Íslandsvegur 10 B, er opin mánadag–fríggjadag kl. 9–15. Telefon 17597. Telefax 13609. Tekstteleton, ring 0032 og bið um 16929. Limafundur hvørt mánakvøld kl. 19–23.**